

# Føroyar fyrimynd í bretska parlamentinum

**Tað er ikki hvønn dag, at Føroyar verða gjørd til fyrimynd í útlendskum parlamentum. Men tað hendi í vikuni, tá orðaskiftið var um framtíðar bretska fiskivinnupolitikkin. Fleiri tinglimir vístu á, hvussu væl virkandi føroyska fiskiveiðiumsitingin er**

FISKIVINNA OG POLITIKKUR
*Jan Müller*

Í sambandi við, at Alex Salmond, MP (formaður fyri SNP í Westminster), hevði lagt uppskot fram fyri Undirhúsið um, at bretar skulu taka seg burtur úr felags fiskivinnupolitikkinum hjá ES, var orðaskifti um fiskivinnupolitikk í bretska Undirhúsinum týsdagin.

Stórur áhugi er í løtuni fyri føroysku fiskiveiðuumsitingini. Sendistova Føroya í Bretlandi skrivar á heimasíðu síni, at hon hevur í seinastuni fingið fleiri uppringingar frá bretskum politikkarum, sum hava spurt um føroysku fiskiveiðuumsitingina. Sendistovan hevur í hesum sambandi sent teimum ymisk skjøl á enskum um føroysku skipanina.

Sambart heimasíðuni hjá føroysku sendistovuni í Bretlandi var tað serliga framsøgumaðurin fyri konservativa flokkin John Whittingdale MP, sum var hugtikin av føroysku fiskiveiðuumsitingini. Hann vísti í røðu síni á, at konservativi flokkurin hevði ásannað, at felags fiskivinnupolitikkurin í ES ikki virkaði og mælti til, at bretar vendu aftur til sjálvir at umsita hetta málsøkið. Í hesum sambandi vísti hann á føroysku skipanina, sum hann helt vera sera áhugaverda og burdi verið ein fyrimynd fyri, hvussu m.a. fiskiskapurin í Norðsjónum varð umsitin.

Niðanfyri er brot burtur úr røðuni hjá framsøgumanninum fyri Konservativa flokkin John Whittingdale MP. Fleiri aðrir parlamentslimir vístu eisini á føroysku fiskiveiðumsitingina í sínum røðum.

John Whittingdale MP segði m.a.:

"In the Faroe Islands, fishing is the principal source of income. The incentive to manage stocks in a sustainable way is even greater. Under their system, vessels are grouped according to size and gear type. Each group is allocated a set number of fishing days per year, which are divided among the vessels. That is combined with gear regulations designed to protect juvenile fish, as well as closures of extensive areas to active gear, such as trawls, to protect nurseries and spawning stocks.

By allocating fishing days rather than stock quotas, mixed fisheries are allowed, giving the entire catch an economic value. The system works extremely well in achieving its aim that not more than a third of each stock should be taken every year. It is well supported by the fishermen, who are closely involved in deciding the number of fishing days to be allotted each year. As one respected fishing journalist recently wrote:

There are always some complaints, but the grass roots hatred and sheer loathing of the management system that is heard from fishermen in Iceland and most EU countries is entirely absent in the Faroes. Unbelievably, everyone in the Faroes appears happy with their system. Stocks are healthy and fishing is flourishing.

Seinni í røðuni segði John Whittingdale MP:

"By any measure, the CFP has been a disaster for the British fishing industry, which is why my right hon. and learned Friend the Leader of the Opposition reaffirmed on Sunday that we are committed to a policy of withdrawing from the Common Fisheries Policy and restoring national control for our fishing industry.

In the next few months, we will develop a new way of managing fish stocks based on controlling inputs by limiting fishing effort and banning industrial fishing in place of the discredited and damaging quota system of output controls. As I have said, other places such as the Faroes operate such management schemes extremely successfully. We therefore intend to sit down with the fishermen to work out the details of an alternative to the CFP."

Orðaskiftið í bretskas parlamentinum um førysku fiskiveiðiumsitingina kann síggjast og hoyrast á heimasíðuni hjá bretska parlamentinum: www.parliamentlive.tv við at trýsta á "archive" og síðani leita eftir "fisheries".



UTTAN ÚR HEIMI

# Danskir fiskimenn bjóða ráðharranum lykilin til stýrihúsið

**Danskir fiskimenn góðtaka ikki ætlaðu skerjingarnar hjá ES. Teir ætla at geva ráðharranum lyklarnar til skipini, so hon kann taka teir við sær til Bruxelles og leggja teir har.**

FISKIVINNUPOLITIKKUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Danski fiskimálaráðharrin, Mariann Fischer Boel, hevur fingið eini greið boð frá sínum fiskimonnum, nú hon skal til Bruxelles at umrøða ætlanina hjá ES-nevndini at skerja kvoturnar næsta ár.

– Vit ætla at lata ráðharran fáa lyklarnar til skipini, áðrenn hon fer avstað. Fær hon ikki eitt úrslit, sum vit kunnu góðtaka, kann hon lata fiskivinnukommiserin Franz Fischler fáa teir. So kann hann yvirtaka danska fiskiflotan, tí vit klára okkum ikki við fleiri skerjingum, sigr Jens Søndergaard, sum er formaður í fiskimannafelagnum í Lemvig.

Jens Søndergaard var millum røðararnar á einum fundi, sum misnøgdir fiskimenn skipaðu fyri í fiskivinubýnum Thorsminde mikukvøldið. Fleiri fiskimenn tóku undir við ætlan hansara, og nú verður roynt at fáa 50 skip at seta kós ímóti Keypmannahavn um vikuskiftið. Har verða skipini bundin, og síðani ætla fiskimenninir í fiskimálaráðið við lyklunum.

Tað eru ikki bara danskir fiskimenn, sum mótmæla ætlaðu skerjinunum hjá ES-nevndini. Í Antwerpen gingu belgiskir fiskimenn mótmælisgongu, og í fleiri fronskum havnum hava illir fiskimenn stongt partar av bryggjuni.

ES-nevndin mælir til at steðga øllum toskafiskiskapi í Norðsjónum, samstundis sum aðrar kvotur skulu skerjast nógv.

# Ein øðrvísi forseti



*Forsetin í Venesuela, Hugo Chavez, er á mangan hátt øðrvísi enn flestu starvsbrøður hansara kring heimin. Her hevur hann lagt seg niður at práta við ein hermann á einari hermannalegu nærhendis høvuðsstaðnum Caracas. Kanska dyrgir hann eftir stuðuli, tí andstøðan vil hava eina fólkaatkvøðu um at koyra forsetan frá.*

# Póland hóttir ES-grundlóg

**Um vikuskiftið skal ES viðgera nýggju grundlógina, men pólendingar liggja í buktini.**

ES-GRUNDLÓG
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Polski forsetin, Aleksander Kwasniewski, hóttir nú við at forkoma ætlanini um eina grundlóg fyri Evropasamveldið.

Eftir verandi uppskoti skal ráðharraráðið hava myndugleika til at taka avgerðir við sonevndum dupultum meiriluta. Tað merkir, at meiri enn helmingurin av londunum skal atkvøða fyri, men tey skulu samstundis umboða meiri enn 60 prosent av fólkatalinum í samveldinum.

Men Póland og Spania vilja ikki góðtaka hesa mannagongdina, tí tey halda hana vera eitt afturstig samanborið við Nice-sáttmálan frá 2000. Men hini londini halda, at hesin sáttmálin gongur ov langt, tí hann gevur Pólandi og Spania líka nógvar atkvøður sum Týsklandi, sjálvt um týska fólkatalið er tvær ferðir størri. Men Póland ætlar sær ikki at slaka.

– Skal hatta við í grundlógina, siga vit nei, segði Aleksander Kwasniewski, forseti, við BBC fyrrakvøldið.

## Menninir ráða í kommununum

Hóast danir hava tosað og lóggivið um javnstøðu millum kvinnur og menn í mong ár, gongst tað illa hjá kommununum og amtunum at fáa hesi viðurskiftini upp á pláss.

Tað sæst í einari nýggjari frágreiðing. Hon vísir týðiliga, at í kommunum og amtum er javnstøða ikki galdandi, hvørki í tí politiska partinum ella tí umsitingarliga. Harafturat sæst, at nógvar kommmunur hava onga ætlan um, hvussu tær skulu røkka javnstøðu, hóast kommunurnar sambært lógini skulu leggja eina slíka ætlan annaðhvørt ár. Tær skulu eisini gera eitt yvirlit yvir javnstøðuviðurskiftini, men heldur ikki her verður lógin fylgd.

Ráðharrin í javnstøðumálum, Henriette Kjær, er ikki fegin um innihaldið í nýggju frágreiðingini. Hon sigur, at kommunurnar gera alt ov lítið fyri at bøta um javnstøðuna, og at tær heldur ikki leggja nóg stóran dent á at finna kvinnur til leiðandi størv í kommunalu umsitingini.

## Harðskapur í fongslum

Bretsku fongsulsmyndugleikarnir viðganga nú sambært blaðnum Guardian, at fangar verða illa viðfarnir í landsins fongslum.

Blaðið hevur fingið fatur á rættarskjølum, har fongsulsmyndugleikarnir hava viðgingið í minsta lagi 122 tilburðir av harðskapi ímóti fangum í árunum frá 1995 til 1999. Eitt nú vórðu fjúrtan fangar illa bukaðir í fongslinum Womwood Scrubs í London. Hetta málið var so álvarssamt, at tað helst er tann ringasta gølan í bretska fongsulsverkinum í nýgggjari tíð, skrivar Guardian.

Í einum føri varð ein íri, sum sat í fongslinum, hildin í einari song og kvaldur, meðan átta fangavørðar bukaðu hann. Sambært skjølunum hevði ein av fangavørðunum kravt, at fangin skuldi nevna hann "enskan harra", men tað vildi írin ikki.

## Bankastjóri í geglið

Í Kina hava myndugleikarnir dømt ein fyrrverandi bankastjóra tólv ára fongsul fyri svik.

Wang Xuebing var stjóri í Bank of China og China Construction Bank, sum tað almenna eigur. Í november í fjør varð hann koyrdur úr kommunistaflokkinum, og tá vildu kinesiskir fjølmiðlar vera við, at hann hevði tikið ímóti 341.000 amerikonskum dollarum í mutri, og at hann harafturat hevði fingið 17 ur av teimum dýru sløgunum. Fjølmiðlarnir vildu eisini vera við, at hann hevði dusað sær í marglæti, og hann fleiri ferðir hevði havt vitjan av ungum kvinnum av tí lættara slagnum í Hongkong.

Í rættinum varð fyrrverandi bankastjórin funnin sekur og dømdur tólv ár aftan fyri rimarnar. Útlendsk bankafólk, sum kenna hann, siga, at hann varein sera kurteisin bankamaður, dugdi sera væl enskt, og at hann uttan iva var ein av høvuðsmonnunum aftan fyri arbeiðið at menna og nútímansgera tann kinesiska fíggjarheimin.

## Illveður í Noregi

Tríggjar ferðir ta seinastu vikuna hava norsku veðurmenninir boðað frá stormi í pørtum av landinum.

Í síðstu viku herjaði illveðrið Clara í Norðurnoregi, og nakrar dagar seinni gjørdi illveðrið Dyre um seg í Møre og Romsdal og Trøndelag. Hetta illveðrið rakti eisini partar av eysturlandinum, har fleiri túsund húsarhald mistu streymin. Tað vísti seg, at elmastrar vóru farnar nógvastaðni, og summi noyddust at bíða upp í trý samdøgur, til streymurin kom aftur.

Í gjár boðaðu veðurmenninir aftur frá illveðrið. Hesaferð var tað Edda, sum gjørdi um seg Lofoten, Vesterålen og syðra parti av Troms. Veðurmenninir spáddu 25 metrar um sekundið nógvastaðni og 30 metrar um sekundið í Lofoten. Gjáramorgunin avgjødu myndugleikarnir at steingja fleiri fjallavegir, og fleiri ferjur avlýstu eisini siglingina.